## Fimti dysturin er í kvøld

Seinasti dysturin hetta umfarið av Vodafone-deildini er í Sarpugerði í kvøld, har Víkingur tekur ímóti EB/Streymi. Bæði liðini teljast millum teirra, sum vilja vera við heilt frammi í oddinum í ár, men við ávíkavist sjey og seks stigum eru ráðini ikki til at missa so øgiliga nógv afturat. Tí er lítil ivi um, at talan verður um tvey lið, sum vilja geva nógv fyri at ogna sær stigini í kvøld, og tað plagar vanliga at borga fyri góðum undirhaldi.



## Hans Jørgen leikbannaður

Tað eydnaðist ikki hjá Víkingi at fáa leikbannið hjá Hans Jørgini Djurhuus strikað. Hans Jørgin fekk reytt kort, tá hann rendi HB-venjaran um koll í miðvikuuppgerðini hjá Víkingi, og ta dómaraavgerðina vóru víkingarnir alt annað enn nøgdir um. Tí varð kæra send til FSF um málið, men eftir øllum at døma er hendan avvíst, tí sambært Jógvan Martini Olsen, venjara, hevur Víkingur fingið boð um, at Hans Jørgin Djurhuus fær leikbann í ein dyst.

# 19 ferðir gull til Magnus

**Magnus Jákupsson vann ikki færri enn 19 gullmerki, tá stór svimjikapping var í Klaksvík**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

14 ára gamli havnardrongurin var nógv mest vinnandi svimjarin í Klaksvík.

Hann vann allar kappingarnar sum hann tók lut í í Klaksvík – 16 persónligar og 3 stafettir íalt 19 gullmedaljir – eitt satt bragd, sum bara heilt fáir svimjarar áður hava megnað undan honum.

Magnus hevur hesi árini hann hevur svomið, mest gjørt seg galdandi í ryggsvinjing. Hóast við rygg sum sergrein, hevur hann miðvíst arbeitt við at menna hinar greinarnar eisini.

Hesa kappingina vísti tað seg, at tað var tað sama um hann um hann svam langt ella stutt 50 frí, 200 bringu ella 800 frí – hann vann, tað sum var at vinna.

Hann vann í Klaksvík 19 gull og svam seg til 9 persónligum met.

Hann hevur í dag 2 bestu tíðir í danska kongaríkinum 50 rygg við tíðini 28.8 og 100 rygg við tíðini 1.00.68. Somuleiðis hevur hann 3 pláss í 200 rygg við 2.15.35 og fleiri aðrar góðar plaseringar.



*Magnus Jákupsson fær her handað eitt av sínum 19 gullmerkjum*

# Søguskriving á Rás2

**Fyri Miðlahúsið var tað ein stór løta, tá dysturin á Argjum varð sendur beinleiðis á Rás2. Men størsti vinnarin mundi kortini vera fótbólturin**

ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við vanda fyri at koma undir ákæru fyri nalvaskoðan mugu vit kortini staðfesta, at talan var um sera stolta løtu fyri alt konseptið kring Miðlahúsið, tá røddin hjá Hilmari Jan Hansen rungaði runt landið við beinleiðis frásøgn frá dystinum millum AB og 07 Vestur sunnudagin.

Hetta var nevnliga fyrsta ferðin, at beinleiðis útvarping frá føroyskari ítróttarhending varð send á aðrari rás enn teirri almennu.

Møguleikin fyri hesum er sum so beint yvir 10 ára gamal, tí fríggjadagin í farnu viku vóru júst 10 ár síðani, at táverandi Atlantic Radio fyri fyrstu ferð sendi sínar bylgjur út á FM 102.

Nýstovnaða rásin royndi seg eisini við frásagnum fyrstu tíðina, men øll loyvi hesum viðvíkjandi vóru ikki í rættlag, og tí varð tann tátturin líka sum kvaldur í føðingini.

Síðani Sosialurin fyri hálvum øðrum ári síðani keypti Rás2, hevur ítrótturin fylt sín náttúrliga part av sendiflatuni. Bæði sum náttúrligur partur av tíðindapartinum og sum innihald í sjálvstøðugum sendingum.

Ikki minst hevur profileringin verið stór í triðja hálvleiki, sum byrjaði í fjør, og har ljóskastarin fyri tað nógva hevur peiggjað móti fremstu fótbóltsdeildini. Og tað kanska í ov stóran mun vildi onkur sagt.

At senda beinleiðis hevur alla tíðina verið nakað, sum vit hava sæð sum ein upplagdan møguleika í heusm, men fram til í gjár var hetta meira ein vón og ein dreymur.

Betraða tøknin, ágrýtnu starvsfólkini og møguleikin at avgreiða dystir klokkan 17 sunnudag lótu tó av álvara upp fyri møguleikanum, og so var sum maðurin segði bara at fara ígongd.



Amerikumenn plaga at siga, at einastu skotini, sum ikki kiksa, eru tey, sum tú ongan tíð roynir. Hesa ferð sat skotið í øllum førum rættiliga væl, og longu nú eru vit í ferð við at eftirmeta og fyrireika næsta stigið, so vónandi verða tilboðini til lurtararnar enn betri og fjølbroyttari í framtíðini. Fyrst og fremst til frama fyri ítróttin.

# 109 bátar kappast um FM

Til samans hava 109 bátar meldað seg til komandi kappróðrarár. Tær 109 manningarnar eru hesar

**5-mannafør gentur**
1 Blikur
2 Drekin
3 Erla Kongsdóttir
4 Falkur
5 Fípan fagra
6 Firvaldur
7 Frúgvin
8 Havfrúgvin
9 Hvassi
10 Jalluri
11 Junkarin
12 Kollur
13 Ørnin
14 Ritan
15 Roydin Fríða
16 Sandingur
17 Sílið
18 Spógvin
19 Strípan
20 Svanur
21 Tambar
22 Teistin
23 Tekla
24 Tjaldrið

**5-mannafør kvinnur**
1 Blikur
2 Drekin
3 Erla Kongsdóttir
4 Fípan fagra
5 Frúgvin
6 Havfrúgvin
7 Hvassi
8 Jallurin
9 Katla
10 Kollur
11 Ritan
12 Sandingur
13 Sílið
14 Strípan
15 Tambar
16 Teistin
17 Tekla
18 Tjaldrið

**5-mannafør dreingir**
1 Blikur
2 Drekin
3 Fípan Fagra
4 Firvaldur
5 Jallurin
6 Junkarin
7 Katla
8 Kollur
9 Ørnin
10 Ritan
11 Roydin Fríða
12 Sandingur
13 Sílið
14 Spógvin
15 Strípan
16 Tambar
17 Teistin
18 Tekla
19 Tjaldrið

**6-mannafør kvinnur**
1 Lómur
2 Gongurólvur
3 Hvessingur
4 Jarnbardur
5 Kollfirðingur
6 Páll Fangi
7 Riddarin
8 Romvlvs
9 Skúgvur
10 Smyril
11 Sólmundur
12 Sundabáturin

**6-mannafør menn**
1 Lómur
2 Árnafjarðabáturin
3 Bismarck
4 Fortuna
5 Gongurólvur
6 Hósvíkingur
7 Hvessingur
8 Jarnbardur
9 Kollfirðingur
10 Páll Fangi
11 Riddarin
12 Rodni
13 Romvlvs
14 Skúgvur
15 Smyril
16 Sólmundur
17 Strálan
18 Sundabáturin
19 Tvørabáturin

**8-mannafør**
1 Argjabáturin
2 Árnfirðingur
3 Heiðabáturin
4 Knørrur
5 Kvívíkingur
6 Nevið Reyða
7 Ørvur
8 Toftaregin

**10-mannafør**
1 Eysturoyingur
2 Havnarbáturin
3 Hoyvíkingur
4 Klaksvíkingur
5 Nólsoyingur
6 Ormurin Langi (Róðrarfelagið Knørrur)
7 Ormurin Langi (Vágs Kappróðrarfelag)
8 Skálabáturin
9 Vábingur